Fyrilestur

# Evolutiónslæran hjá Darwin

Eyðfinn Magnussen

Fróðskaparsetur Føroya, Náttúruvísindadeildin

Í fyrilestrinum verður greitt frá menningarlæruni hjá Darwin, sum lýsir, hvussu náttúrulig útveljing broytir livandi verur. Hendan menningarlæran hevur kollvelt okkara fatan av heiminum, og Darwin verður av mongum mettur at vera tann týdningarmesti persónurin, sum livað hevur.




Í fyrilestrinum verður greitt frá lívsins fjølbroytni og hvussu nógv ymisk sløg av dýrum og plantum, eru her á jørð. Greitt verður frá menningarlæruni hjá Darwini, og hvat tað var, sum fekk hann inn á hendan tankan. Hugtakið "Sexual selection" verður viðgjørt, og komið verður inn á tann sentrala leiklutin, sum evolutiónslæran hevur í nútíðar lívfrøðini. At enda verður við dømum víst á, at evolutiónslæran hjá Darwin eisini ger um seg í Føroyum.